NORÐOYA
BÚ- OG HEIMATÆNASTA

# *Virkishúsið Smæran – reglugerð*

***Virkishúsið Smæran*** er eitt tilboð til borgarar yvir 60 ár, har tey kunnu hava ymisk virkistilboð og samveru. Innihaldið skal fremja heilsu, trivnað og møguleikar fyri at skapa netverk og vinabond.

***Virkishúsið Smæran*** skal geva borgarum í Norðoyggjum, sum eru yvir 60 ár, møguleikar fyri sosialari samveru. Smæran skal brúkast til innihaldsríkt virksemi, har borgarar fáa møguleika at styrkja sínar likamligu, sálarligu og sosialu førleikar, til frama fyri lívsgóðsku og trivnað.

***Virkishúsið Smæran*** er eitt stað, har allir borgarar yvir 60 ár skulu kenna seg vælkomnar. Samveran byggir á vælvilja til at stuðla og hjálpa hvørjum øðrum. Ymiskleikin hjá teimum, sum koma at nýta Smæruna, fer vónandi at síggjast aftur í ymisku virkistilboðunum.

***Virkishúsið Smæran*** hevur eitt fimm mannað brúkararáð, ið samskipar virkistilboðini, og sum er soleiðis mannað:

1. Norðoya Bú- og Heimatænasta velur ein lim
2. Íbúgvararnir undir Kráarbrekku velja ein lim
3. Eldraráðið velur ein lim
4. Brúkararnir í Smæruni velja tveir limir

Limirnir í brúkararáðnum verða valdir fyri tvey ár í senn, tveir limir standa fyri vali í januar mánað líka ár, og tríggir standa fyri vali í januar mánað ólíka ár.

***Virkishúsið Smæran*** bjóðar fram virkistilboð til allar borgarar yvir 60 ár. Tilboðini skulu ikki vera privat, og skulu vera óheft politiskt og átrúnaðarliga; tó kunnu íbúgvararnir undir Kráarbrekku leiga Smæruna til egnar føðingardagar og merkisdagar, við tað at Smæran er ein partur av verkætlanini undir Kráarbrekku. Til ber at leiga Smæruna við at venda sær til Rutt Norðoy Joensen, skrivara hjá NBH, millum kl. 10-14 á tlf 410045 mánadag til hósdag. Tað stendur øllum frítt at koma við uppskotum ella at fyriskipa tiltøk; tó er tað brúkararáðið, sum samskipar tiltøkini.

***Virkishúsið Smæran*** hevur nakrar skilhaldsreglur og tryggjar brúkararáðið, at hesar verða upplýstar og fylgdar, tá ið hølini skulu nýtast til tiltøk.

***Virkishúsið Smæran*** kann leigast út til felagsskapir, ið hava tilknýti til fólk yvir 60 ár. Ikki er møguligt hjá øðrum at leiga hølini til føðingardagar og aðrar merkisdagar. Norðoya Bú- og Heimatænasta ásetur leigugjaldið, sum skal gjaldast til Miðlan.

***Virkishúsið Smæran*** leigar ella lænir ikki hølir út til tiltøk, ið hava vinnuligt endamál.

**17. oktober 2016**
**Norðoya Bú- og Heimatænasta**